## Shalit er lykilin

Ísraelski hermaðurin Gilad Shalit, sum bleiv burturfluttur í Gaza-geiranum fyri skjótt trimum árum síðani, skal latast leysur, áðrenn Ísrael kann ganga við til at lata markið til Gaza-geiran uppaftur. Tey greiðu boðini hevur Hamas fingið frá ísraelsku stjórnini, skrivar Reuters. Stjórnin viðgjørdi í gjár eitt uppskot um vápnahvíld við Hamas og samdist um, at Gilad Shalit skal latast leysur, áðrenn vápnahvíld kann koma upp á tal. Hamas hevur svarað, at tann burturflutti hermaðurin hevur einki við vápnahvíldina at gera.



## Skókastarin í rættinum

Irakski blaðmaðurin Muntazer al-Zaidi, sum gjørdist heimskendur, tá hann lat seg úr skónum og tveitti teir eftir fyrrverandi forsetanum George W. Bush, kom fyrrapartin fyri rættin í Bagdad. Sera strong trygdartiltøk vóru í og uttan fyri dómhúsið, tí í øllum teimum arabisku londunum verður blaðmaðurin mettur sum sonn hetja. Irakska ákæruvaldið hevur ákært hann fyri ágang ímóti einum útlendskum ríkisleiðara, og verður hann dømdur sekur, kann tann heimskendi skókastarin fáa upp í 15 ára fonsgul, skrivar AP.

# pensjónistar



*At veva er nýggjasta »dillan« á dagtilhaldinum á Sandi*

ein flutningsskipan er inni í myndini at flyta brúkararnar frá hinum bygdunum til Sands.

- Húsavíkar Kommuna hevur boðað frá, at hon er positivt sinnað at verða við, og eg vóni, at Skálavíkar Kommuna og Skopunar Kommuna eisini megna at verða við til at lyfta hesa uppgávuna, sigur Páll á Reynatúgvu.

Hann vónar, at tað fer at bera til at varðveita dagtilhaldið á Sandi, tí hetta tilboðið hevur sera stóran týdning fyri tey eldru

- Hetta er eisini eitt hitt best vitjaða dagtilhaldið í landinum, og hevur longu prógvað sítt virði sum fyribyrgjandi tiltak fyri tey eldru, so hesi kunnu verða verandi so leingi í egnum heimi sum tilber, sigur Páll á Reynatúgvu.



*Harriet Krog er 81 ára gomul og ein av trúføstu brúkarunum av tilhaldinum. Tað verður ógvuliga harmiligt, dettur dagtilhaldið niður fyri, heldur hon*



*Kristina á Reynatúgvu er dagligur leiðari á dagtilhaldnum í Sandoynni*